





## Jomfrútilboð við nýggju Norrönu

Sigl til Danmarkar við gomlu Norrönu og heim við nýggju Norrönu

**Bilpakkar Tórshavn - Hanstholm 03.04. Lübeck - Føroyar 08.04.**

| | 4-koyggjuk. v. wc/bað innv. á gomlu Norrönu/ 4-koyggjuk. v. wc/bað innv. á nýggju Norrönu | 4-koyggjuk. v. wc/bað innv. á gomlu Norrönu/ 4-koyggjuk. v. wc/bað útv. á nýggju Norrönu | 2-koyggjukamar v. wc/bað |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 fólk | 12.000 | 14.400 | 26.880 |
| Bilur + 3 fólk | 9.440 | 11.320 | 20.160 |
| Bilur + 2 fólk | 6.860 | 8.240 | 14.300 |
| Bilur + 1 fólk | 4.160 | 5.000 | 7.880 |

**Bussferð i sambandi við Jomfrútúrin**

Fráferð av Havnini við gomlu Norrönu 03. april kl. 22.00 og heimferð við nýggju Norrönu 08. april kl. 10.00. Eftir komu til Hanstholm verður koyrt beinleiðis til Hotel Hanstholm har gist verður fyrstu náttina. Um kvøldið døgurði á hotellinum. Sunnumorgunin 06. april verður koyrt suðuryvir til Lübeck har gist verður mánanáttina á hotelli. Mánadagin verða útferðir gjørdar i Lübeck.
Kl. 17.00 sleppa tey ferðandi umborð á Norrönu og gist verður i 4-koyggjukømrum við wc/bað innv.

Úr bara 4.165,-

*Íroknað prísin er:*
*Ferðin fram og aftur við Norrönu i 4-koyggjukømrum við wc/bað innv. Hartil uppihald á hotelli i dupultkømrum við wc/bað. Á hotellunum íroknað ½ vistarhald. Hartil er danskur luksusbussur og ferðaleiðari við á allari ferðini. Eykaprísur fyri betri kamur.*



Eisini verður skipað fyri framsýningartúrum til Hetlands og Íslands og ferðaskráin fyri hesar verður hendan:

**Framsýningartúrur Hetland**
(skipið liggur nátt i Lerwick)

| Havn | Dagur | Koma | Fráferð |
|---|---|---|---|
| Tórshavn | 14.04 | - | 23.50 |
| Lerwick | 15.04 | 14.00 | - |
| Lerwick | 16.04 | - | 18.00 |
| Tórshavn | 17.04 | 10.00 | - |

**Framsýningartúrur Ísland**
(skipið liggur nátt á Seyðisfirði)

| Havn | Dagur | Koma | Fráferð |
|---|---|---|---|
| Tórshavn | 21.04 | - | 16.00 |
| Seyðisfjørður | 22.04 | 10.00 | - |
| Seyðisfjørður | 23.04 | - | 17.00 |
| Tórshavn | 24.04 | 12.00 | - |

**Ferðaseðlakostnaðurin fyri hvønn er:**

| | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. | Bilar max. 5m |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lübeck-Føroyar | 1.800 | 2.360 | 3.080 | 4.000 | 5.200 | 920 |
| Tórsh.-Lerwick-Tórsh. Tórsh.-Seyðisfj.-Tórsh. | 1.200 | 1.360 | 1.400 | 1.560 | 1.640 | |

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo



# Eingin at hitta

**Í fiskimálaráðnum er ringt at fáa orð á fólk, sum kunnu siga nakað um fiskiloyvini hjá Skørini og Jógvani S**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*Sosialurin ætlaði at spyrja landsstýrismannin við fiskivinnumálum, um tað er rætt, sum sagt veðrur, at Skørin skal brúkast til annað fiskiloyvi, nú hennara egna er latið Jógvani S. Men landsstýrismaðurin hevur verið upptikin á fundi í eina tveir dagar*

Hvørki landsstýrismaurin við fiskivinnumálum ella embætisfólk, sum varða av fiskiloyvum í Fiskimálaráðnum, hava verið at hitt, tá roynt hevur verið at fingið orð á tey frá mánamorgni, til blaðið fór til prentingar týsdag. Menn eru á fundi, verður svarað, og hóast boð eru løgd við ynski um at fáa tey at seta seg í samband við blaðið, frættist heldur einki.

Biðið er um alment innlit í skjølini, sum hava við málið um fiskloyvið hjá Jógvani S at gera, men sambært lóg um alment innlit kunnu ganga upp til 10d agar, til Fiskimálaráðið hevur skyldu at svara umsókníni tíansheldur útflýggja skjølini.

Bæði frá fólki í fiskivinnuni og frá politikarum verður áhaldandi sagt, at málið um fiskiloyvið hjá Jógvani S er ikki so einfalt, at tað bara snýr seg um Jógvan S og tey bæði skipini, sum hann hevur fingið fiskiloyvi frá.

Sagt verður, at annað av teimum skipunum, Skørin, skal brúkast aftur við øðrum loyvi. Og her er rættiliga talan um øking av veiðitrýstinum, sambært vinnufólki og politikarum.

Tí ætlaði Sosialurin at seta landsstýrismanninum við fiskivinnumálum hesar spurningar:

1)
Er tað rætt, at útróðrarbáturin Leitið (19,76 BT) av Viðareiði skal lata línuskipinum Skørini (80,05 BT) úr Klaksvík veiðiloyvi sítt?

2)
Er tað rætt, at línubáturin Skørin út Klaksvík síðani skal fáa snellukvotuna hjá trolbátinum Gáshøvda av Viðareiði, sum hesin fekk við, tá hann í fyrru helvt av nítiárunum varð keyptur til Viðareiðis og síðan hevur varðveitt og selt ár um ár til snellubátarnar, sum royna eftir upsa undir Íslandi, meðan Gáshøvdi øll árini sjálvur hevur trolað undir Føroyum?

Leitið og Gáshøvdi hava sama útgerðarmann.

3)
Er tað rætt, at gamli Stapin, sum saman við Skørini misti veiðiloyvi, tá nýggjur Stapi varð keyptur, skal inn aftur í fiskiflotan fyri útróðrarbátin Gullborg (ex. J.C. Svabo) og sostatt økja veiðitrýstið munandi, umframt at hann so verður fimta stállínuskipið yvir 110 tons, sum fiskar av útróðrardøgum uttan fyri seks fjørðingar?

# Viðgerðin er ólóglig

**Tað er beinleiðis brandólógligt, sum gjørt er í málinum um fiskiloyvið hjá Jógvani S, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, hevur sett landsstýrismanninum við fiskivinnumálum sjey spurningar í samband við veiðiloyvið hjá Jógvani S*

Tað er í stríð við lógina um vinnuligan fiskiskap at lata einum línuskipi upp á meiri enn 300 tons tvey útróðrarloyvi.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap, sum er frá 10. mars 1994, stendur í grein fimm stk. 12 soleiðis: »Fiskifør kunnu ikki skifta høvuðsbólk sambært § 28, stk. 1, aftaná at henda áseting hevur fingið gildi.«

Men ta, sum hent er í hesum førinum er júst, at Jógvan S, sum er stállínuskip yvir 110 tons, fær tvey fiskiloyvi frá bátum undir 110 tons og sostatt skiftir í lægri bólk.

– Hatta er beinleiðis brandólogligt, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sum hevur sett landsstýrismanninum við fiskivinnumálum fyrispurningin á tingi um sjey punkt í hesum ávísa málinum.

Tað stutta av tí langa er, sigur Tórjørn Jacobsen, at nú liggur fiskivinnuumsitingin hjá okkum og etur fiskidagaskipan okkara úr báðum endum og holar hana út innanífrá. Hesa somu skipan, sum fyrrverandi landsstýrismaðurin var heilt suðuri móti Antarktis og reypaði av herfyri.

– Hetta, sum hendir nú, eigur at fáa fylgjur fyri bæði umsiting og politikarar, sum varða av fiskivinnuni, heldur Tórbjørn Jacobsen.

At Anfinn Kallsberg, løgmaður nú rekur Annlis Bjarkhamar úr landsstýrissessinum, metir Tórbjørn Jacobsen sum eina roynd at fáa vent eygunum burtur frá hesum málinum um fiskiloyvið hjá Jógvani S og í øðrum lagi at fáa Tjóðveldisflokkin at slíta samgonguna, so Fólkaflokkurin sleppur úr Fiskimálaráðnum.

# Væntaði hetta svansið

**Formaðurin i vinnunevndini er ikki kløkkur av hesum málinum um fiskiloyvið hjá Jógvani S. Hetta svansið er ikki annað enn væntandi var, sigur hann**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*– Hetta er ikki annað, enn alla tíðina var væntandi frá fyrsta degi, fólkafloksmenn fóru at tosa um økta umsetiligheit, sigur Henrik Old. løgtingsmaður*

– Eg ávarðaði í móti júst hesum, beinanveg fólkafloksmenn fóru at tosa um økta umsetiligheit í fiskivinnuni, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevnd løgtingsins.

Hann sigur, at hetta er ikki annað enn tað, hann var púra greiður yvir, fór at henda. Og nú eru longu fýra dømi um, hvussu hendan økta umsetiligheitin virkar.

Hann vísir á, at JógvanS er fjórða stóra línuskipið, sum fiskar við einum ella øðrum »bastardloyvi«, sum ongastðani kann flokkast reiðiliga eftir lógini um vinnuligan fiskiskap.

Línuskipini West Freezer, Fuglfirðingur og Hoyvíkingur fiska øll á leiðunum hjá stóru línuskipunum yvir 100 tons uttan fyri seks fjórðingar við veiðiloyvum, tey hava keypt upp fýra útróðrarbátum undir 110 tons. Nú kemur so Jógvan S afturat, vísir hann á.

Hetta er beinleiðis í stríð við lógina um vinnuligan fiskiskap, sum ikki loyvir flyting av førum millum høvuðsbólkar, er hann samdur við Tórbirni Jacobsen í.

# Nú talar samvitskan at

**Hetta bara versnar, og nú havi eg ikki samvitsku til at vera partur av hesum meira, sigur Heini O. Heinesen, løgtingsmaður tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*Nú talar samvitskan at, sigur Heini O. Heinesen*

Tjóðveldistingmaðurin í Norðoyggjum heldur, at málið við fiskiloyvinum hjá Jógvani S er uttan fyri lógarinnar áseting.

Eisini hann vísir til lógina um vinnuligan fiskiskap og flokkingina millum bólkarnar.

Hann heldur, at her er politikkur uppií, og sigur, at nú er tíðin komin til at taka samstarvið við Fólkaflokkin til álvarsliga viðgerð. Sjálvur hevur hann mestan hug at sleppa burtur úr hesi samgnguni, men vísir á at hann er bara ein av tjóðveldisatkvøðunum á tingi.

– Men eg má siga tað, at eg havi ikki samvitsku til at sita í eini samgongu, sum styðjar slíka framferð sum hesa við høvuðstilfeingi okkara, sigur Heini O. Heinesen.